# Brislingur inni á firðunum

**Jákup Sverri, túrur nr. 2116**

**Tíðarskeið: 22-24/4 2021**

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen



**Endamál:** *At kanna brisling í Tangafirði og á Skálafjørðinum.*


## Samandráttur

Ekkókanningar av brislingi á Skálafjirði og Tangafirði vórðu gjørdar í tíðarskeiðinum 22.-24. apríl 2021.

Brislingur var at síggja mest sum allastaðni, har dýpið var meir enn áleið 25 m. Tað var heldur meir av brislingi at síggja á Tangafirði enn á Skálafirði. Um dagin sást brislingurin í smáum torvum nær botni og sum størri stimar uppi í sjónum. Støddin á fiskinum, sum stóð niður móti botni var blandað, mest tvey ára gamal fiskur, meðan skriftin sum sást upp móti vatnskorpuni var smáur ársgamal brislingur. Í skýmingini lyfti brislingurin seg upp frá botni og loystist heilt upp í vatnsúluni.

Longdarbýtið av brislingi er víst í Mynd 2, og talan er um smáan brisling (miðallongd 8.2 cm og miðalvekt 3.5 g). Nakrar hýsur vóru eisini ímillum í trolinum (39-52 cm). Eingin lodna var fingin á túrinum, og sostatt er lodnan, sum var fingin í kanningunum fyri einum ári síðani, ikki at síggja í ár. Tó var lodna fingin fyrr í ár á yvirlitstrolingunum á Landgrunninum, so óvíst er, hvagar hon er farin.




*Mynd 1. Akustiskar skrásetingar av brislingi á Skálafjørðinum og í Tangafirði 22.-24. apríl 2021. 25 m botnlinjur eru teknaðar við ljósagráum.*




*Mynd 2. Longdarbýti av brislingi frá kanningunum 22.-24. apríl 2021.*

## Um túrin

Vit fóru av Havnini hósmorgun 22. apríl og sigldu inn á Skálafjørð at stilla (kalibrera) ekkóloddini. Vit lógu út fyri Hulki, har kalibreringin varð gjørd, og hon gekk væl í góðveðrinum. Dagin eftir kannaðu vit Skálafjørð við ekkóloddi við at sigla í sik-sak kósum inn gjøgnum fjørðin (Mynd 1). og síðani tóva við yngultrolinum út eftir fjørðinum. Tangafjørður varð kannaður á sama hátt, og vit komu heilt norður til Oyrabakka, har vit gjørdu eitt hál suðureftir fjørðinum. Brislingur var fingin í báðum økjunum. Heldur meira var at síggja í ár (apríl) enn um somu tíð í fjør (mars). Veðrið var av tí allarfagrasta hesar dagarnar.




*Mynd 3. Ekkóskrift av brislingi á Skálafirði 23.-24. apríl 2021.*

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært Sýnishondbókini, t.e. at longd, vekt, kyn og búningarstig verður mátað og nytrur tiknar til aldursgreining av brislingi.

## Reiðskapur

Yngultrol við 5 mm meskavídd í posanum, 40 m veir, vektir (140 kg) og yngul-lemmar (340 kg).

## Viðmerkingar

Tvey fólk frá Jarðfeingi vóru við fyri at royna serligu ekkóloddini til botnkanningar (sub-bottom profiler). Hetta gjørdu tey um náttina.

## Fólk við frá Havstovuni

Jan Arge Jacobsen (kanningarleiðari)
Eydna í Homrum, Poul Vestergaard og Leon Smith